**Viðareiðis skúli**
FO-750 Viðareiði
Tlf. 588052 · Teldupostur: vid@skulin.fo

# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Skúlaárið 2006/2007 er eitt tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar leyst at søkja.**

Undirvísingartímatalið er umleið 16 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar skal taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- er við í arbeiðinum áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í :**
- føroyskum í 2. og 3. flokki
- ítrótti í 1. og 2. flokki
- næmingi við serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Lærarаútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 4. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 58 80 52.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Venjingarskúlin

Søkt verður eftir stuðulsfólki til næming í 4. flokki við serligum tørvi. Talan er um 25 tímar um vikuna.

Løn eftir sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Fyrimun hava umsøkjarar við pedagogútbúgving og/ella royndum í mennandi stuðulsarbeiði.

Umsóknin við avriti av møguligum próvskjølum/viðmælum má vera skúlanum í hendi seinast 9. august 2006 á middegi.

Meira fæst at vita við at seta seg í samband við skúlastjóran (313089/213502).

**Venjingarskúlin**
Handan Á 14
100 Tórshavn

## Adventistaskúlin

**Adventistaskúlin**
sóknast eftir lærara 1. august 2006

Okkara skúli er ein frískúli, sum hevur virkað í 40 ár. Hann hevur 116 næmingar frá 1. til og við 7. flokk.

Vit eru 8 lærarar í føstum starvi og ein skúlaleiðari. Vit eru ein kristin skúli, ið leggur dent á samanhald og felagsskap, har tað einstaka barnið fær stuðul til at mennast.

Vit royna at skapa eitt heildarsamstarv millum heim og skúla, soleiðis at foreldrini uppfata skúlan sum ein longdan arm hjá heiminum og øvugt.

**Tað gera vit m.a. soleiðis:**
* Morgunsangur við søgu hvønn dag.
* Tætt samstarv millum starvsfólkini.
* Stutt frá hugskoti til verk.
* Vit síggja skúla okkara sum ein felagsskap, ið byggir á tryggleika, opinleika og álit millum øll, ið starvast her.

**Vit vænta at tú:**
* Hevur eina kristna lívsáskoðan.
* Ert góð/ur við børn.
* Kanst laga teg til ein fjølbroyttan gerandisdag.
* Hevur hugflog og áræði.
* Ert opin fyri nýggjum avbjóðingum
* Hevur hug at taka lut í menningini av skúlanum.

**Vit bjóða tær:**
* Gott arbeiðslag millum góðar starvsfelagar, og góð foreldur at samstarva við.

**Áhugaði kunnu venda sær til:**
Janne Schantz Johnsson, skúlaleiðara, tel. 225054
ella Tórunn Holm, stýrislim, tel. 210473

NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Norðurlandahúsið í Føroyum

**SUMMARFRAMSÝNING 2006**
**Í Klingruni, dansistovuni, og í forhøllini**
Við verkum hjá, Sigrun Gunnarsdóttir, Tita Vinther, Hans Pauli Olsen, Guðrið Poulsen, Kári Svensson, Edward Fuglø, Eyðun av Reyni og Astri Luihn.

**Húsið er opið hesar tíðir um Ólavsøkuna:**
Ólavsøkuaftan 28. Juli 14-20
Ólavsøkudag 29. Juli 14-20
Sunnudagin 30. Juli 14-18

Í Borðkrókinum er høvið at keypa breyð við føroyskum og útlendskum viðskera, køkur, kaffi, te, øl, sodavatn, vín o.a.

Telefon +351351
Norðurlandahúsið í Føroyum
Fax +351350
E-mail: nlh@nlh.fo; http://www.nlh.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á **Oyrna-nasa-hálsadeildini** á Skurðdeplinum er eitt starv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. september 2006 ella eftir avtalu. Starvsbrøkur 0,75 ella 1,0.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Oyrna-nasa-hálsdeildina, tlf. 304510.

**Umsóknarfreistin er** 15. august 2006 kl. 12:00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivligar umsóknir** við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# Roknskaparfólk søkist

Søkt verður eftir roknskaparfólki 3/4 tíð at byrja skjótast til ber og fyribils til 1. august 2007. Møguleiki er fyri leingjan.

Starvið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði og aðrar fyrisitingaruppgávur.

Kunnleiki til Navision Attain og LøttLøn er ein fyrimunur, umframt roknskaparførleika og -royndir.

Talan er um sjálvstøðugt, fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini sunnari fyritøku. Løn og setanartreytir eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjúrður Holm, stjóra, tlf. 210830 ella Duritu Djurholm, roknskaparfólk, tlf. 580833. Tað ber eisini til at senda teldupost til busetur@busetur.fo

Skrivligar umsóknir við prógvum og viðmælum skulu sendast til Búsetur sp/f, Reynsgøta 14, 160 Argir.

BUSETUR
Tel 310830 | www.busetur.fo
BYGGIMEISTARI · TEL +298 210 830 · FAX +298 310 842